FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 4. mai 2023

Hoyringsskriv til lógaruppskot um veiðigjøld

Fíggjarmálaráðið sendi 9. mars lógaruppskot um hækking av veiðigjøldum til hoyring, har freistin at svara bert var eina eina viku. Síðani er uppskotið lagt fyri tingið og sent til viðgerðar í fíggjarnevndini, har Føroya Reiðarafelag hevur greitt frá sínum sjónarmiðum. Hetta hoyringsskrivið er ein samandráttur av teimum viðurskiftum og sjónarmiðum, ið vórðu førd fram undir hoyringini í nevndini.

Samanumtikið mælir Føroya Reiðarafelag til, at lógaruppskotið um hækking av veiðigjøldum verður tikið aftur og møguliga viðgjørt av nýggjum í heyst. Mett verður ikki, at nøkur orsøk er at leggja slíkt uppskot fyri tingið uttan ta neyðugu viðgerðina. Tá ið lógin kemur í gildi, er fiskiskapurin eftir svartkjafti og lodnu liðugur, makrelvertíðin líður ímóti endanum og gjaldið fyri norðhavssild, sum verður fiskað í heyst, verður at kalla óbroytt. Harafturat kemur broytta gjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum í gildi 1. januar 2024. Tí er eingin haldgóð orsøk til at skunda eitt slíkt týðandi uppskot ígjøgnum uttan neyðuga viðgerð. Hetta er at fara lætt um nøkur grundleggjandi viðurskifti í føroyskari fiskivinnu.

Verandi skipan hevur nógvar váðar og vandar fyri reiðarí og manningar, og tí eigur hon at standa sína roynd og verða eftirmett, áðrenn gjøld verða hækkað. Ein hækking av veiðigjøldum merkir, at váðin hjá reiðaríunum økist munandi, meðan landið ikki tekur lut í hesum váða á nakran hátt. Uppskotið vísir, at landið krevur tryggar karmar fyri sínar inntøkur, meðan vinnan skal virka undir einum ógvuliga stórum váða, sum landið á ongan hátt tekur lut í. Tó fær landið bróðurpartin av vinninginum av hesum virksemi.

Samanumtikið hevur uppskotið ongar grundgevingar fyri, hví veiðigjøldini aftur nú skulu hækkast. Undir verandi skipan eru trý av fýra veiðgjøldum hækkað munandi, meðan tað fjórða gjaldið er lækkað. Verandi skipan leggur sostatt upp fyri hækkandi fiskaprísum, og tá fær landið ein størri lut av inntøkunum.

Vantandi viðgerð og metingar

Fíggjarmálaráðið hevur ikki lagt fram útrokningar ella metingar, ið vísa, hvørjar avleiðingar hetta uppskotið hevur, og heldur eingin váðameting er gjørd. Harumframt hevur uppskotið ikki verið viðgjørt millum vinnu og politisku skipanina, og eingin eftirmeting er gjørd av verandi skipan. Hetta átti sjálvsagt at verið gjørt, áðrenn broytingar verða gjørdar í skundi, og tað átti at verið ein natúrligur partur av slíkari viðgerð.

Miðal yvirskotið hjá føroyskum uppsjóvarskipum var 18-19 mió. kr. í 2021, og tað merkir, at fleiri skip høvdu eitt yvirskot, sum var væl lægri enn miðaltalið. Harumframt stavar ein partur av hesum yvirskoti frá lodnu, sum ikki hevur verið skattað, og tí er hetta miðaltalið í veruleikanum lægri, nú tá ið lodna eisini verður skattað. Hetta er tíverri ikki ein partur av viðgerðini hjá landsstýrinum.

Miðal skattingin av uppsjóvarskipum hevur verið útvið 60% í tíðarskeiðnum 2017-2021, har landið sostatt fær væl meira enn helmingin av yvirskotinum. Tí eigur landið nú at vísa hóvsemi í skattingini av vinnuni, tá ið

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

eingin trygd er fyri, at skipanin ikki skapar eitt undirskot hjá reiðaríunum, alla at skattingin gerst ov hørð. Uppsjóvarflotin er í dag samansettur av fleiri skipum, ið hava ymiskt kvotagrundarlag. Tí er umráðandi, at skipanin við veiðigjøldum tekur hædd fyri hesum, soleiðis at øll skipini kunnu virka innanfyri somu skipan við sama gjaldi.

Hækkingarnar, sum nú verða skotnar upp, eru ógvusligar, og skapa eina stóra óvissu fyri alla vinnuna. Sum sæst í talvunum aftast í hesum skrivi hækka gjøldini fyri makrel og svartkjaft við umleið 30% við støði í verandi prísum, meðan gjaldið fyri sild hækkar umleið 10% í mun til verandi gjøld. Gjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum hækkar við 40% og 80% í ávikavist 2024 og 2026. Hetta eru ógvusligar hækkingar, sum verða gjørdar uttan viðgerð og veruliga hoyring. Tá ið ongar grundgevingar fylgja við hesum hækkingum, átti landsstýrið at víst størri hóvsemi í sínari framferð mótvegis reiðaríunum.

Verandi skipan eigur at eftirmetast

Verandi skipan tekur ikki hædd fyri eini støðu, tá ið prísurin fellur nógv frá einum ári til tað næsta. Um hugt verður eftir prísinum á sild, eru dømi um hetta. Um hendan skipanin við veiðigjøldum hevði verið galdandi í tíðarskeiðnum 2016 og 2017, hevði veiðigjaldið verið umleið 44% av avreiðingarprísinum í 2017. Orsøkin til hetta er, at prísurin fall úr nærum 6 kr/kg í 2016 niður í góðar 3 kr/kg í 2017. Tá ið veiðigjaldið verður ásett við støði í prísinum árið fyri, hevði veiðigjaldið blivið ein serstakliga stórur partur avreiðingarvirðinum. Slíkar støðu kunnu altíð standast, og tí eru neyðugt at hyggja nærri eftir hesum.

Ein trupulleiki, sum hevur víst seg undir verandi skipan, er tann stóri munurin á avreiðingarprísinum á makreli ígjøgnum vertíðina. Eftir at føroysk skip hava mist atgongd til bretskan sjógv, er neyðugt at byrja fiskiskapin tíðliga á sumri fyri at kunna fiska alla kvotuna, sum í 2023 verður gott og væl 130.000 tons til føroysk skip.Øll henda kvota skal veiðast í føroyskum og altjóða sjógvi. Atgongdin til norskan sjógv er sum oftast komin seint í lag, og hon er tískil óviss at byggja virksemið á.

Fiskiskapurin byrjar helst í juni mánaða, tá ið prísurin vanliga er lágur, og tá gerst veiðigjaldið ein órímiliga stór byrða í tí fyrsta tíðarskeiðnum. Tá ið byrjað varð í 2022 var prísurin umleið 5 kr/kg, meðan prísurin ímóti endanum av vertíðini nærkaðist 9 kr/kg. Harumframt tók tað drúgva tíð at veiða makrelkvotuna, og tað merkti størri oljunýtslu og hægri útreiðslur hjá skipunum. Ein ætlan átti heldur at verið gjørd, sum eggjar skipum at fiska tíðliga um summarið heldur enn at revsa hesi skip, tá ið prísurin er lágur. Slík viðurskifti áttu at verið viðgjørd undir einari eftirmeting.

Sí útvald veiðigjøld í Íslandi, Grønlandi og Føroyum fyri 2023 áðrenn hækkingarnar:

	Ísland	Grønland	Føroyar
Makrelur	0,17 kr/kg	0,40 kr/kg	1,23 kr/kg
Sild	0,17 kr/kg	0,25 kr/kg	0,89 kr/kg
Svartkjaftur	0,12 kr/kg	0,15 kr/kg	0,31 kr/kg
Lodna	0,27 kr/kg	0,15 kr/kg	0,98 kr/kg (uppskot)
Toskur	0,95 kr/kg	-	1,08 kr/kg (1,94 uppskot)
Hýsa	0,98 kr/kg	-	1,08 kr/kg (1,94 uppskot)

Greitt er, at veiðigjøld á uppsjóvarfisk eru munandi hægri í Føroyum enn í grannalondunum. Hetta setir føroysku skipini í eina verri støðu, tá ið flotin skal skiftast út, og tá ið størri krøv til útlát og onnur atlit til umhvørvið krevja tað. Nú tá ið gjøldini fyri botnfisk í Barentshavinum eisini verða hækkað munandi, eru føroysku skipini munandi harðari skattað enn í líknandi skipanum aðrastaðni sum t.d. í Íslandi.

Í Barentshavinum eru trý nýggj skip bygd, og hesi fáa nú eina stóra hækking í teirra gjøldum samanborið við støðuna, tá ið skipini vórðu bíløgd. Virðið á hesum skipum er umleið 1,2 mia. kr., og gjøldini verða nú fýrafaldað í mun tað fyrsta gjaldið, sum kom í 2020. Hetta við støði í verandi fiskaprísum. Sum áður nevnt fer avkastkravið at økjast við umleið 50 mió. kr. tað fyrsta árið, av tí at kapitalapparatið er nógv dýrkað. Vandi er fyri, at hækkingarnar fáa álvarsamar avleiðingar fyri hesi skip, sum nú verða sett í vinnu í næstum.

Tann føroyska skipanin tekur gjaldið av umsetninginum, og hon tekur ikki hædd fyri nøkrum øðrum viðurskiftum. Tá ið gjøldini frammanundan eru lutfalsliga høg, eigur landið at vísa stórt hóvsemi við áseting av gjøldum, men tað sæst ikki í hesum uppskoti. Í veruleikanum skattar løgtingið í blindum, og tí eigur tingið at vísa varsemi og at taka atlit til vinnurekandi feløg og manningar. Tíverri ynskir landsstýrið ikki at viðgera skipanina saman við fiskivinnuni, og tað merkir eisini viðmerkingarnar til uppskotið.

Uppskotið heldur fast við, at tá ið 8 ára uppboðssølukvotur skulu leggjast um til veiðigjald í 2026, skulu veiðigjøldini aftur hækka. Hetta er eftir Reiðarafelagsins tykki burturvið, og ongar sakligar grundgevingar eru fyri hesi hækking. Landið skipaði eina uppboðssølu í 2018 og 2019, sum í fleiri førum var miseydnað, og tí er ikki rætt at hækka øll gjøld í 2026 orsakað av hesum. Tí eigur tann seinna hækkingin í hesum uppskoti at verða strikað, og skipanin eigur at verða eftirmett, áðrenn fleiri hækkingar verða settar í verk.

Fleiri viðurskifti eru broytt, síðan veiðigjaldslógin varð samtykt í 2021. Hon hevur í veruleikanum bert virkað í eitt ár, og tí eigur hon ikki at broytast longu. Í uppsjóvarflotanum eru fleiri skip komin í flotan, og tað merkir, at sonevnda tilfeingisrentan lækkar. Eisini eru bæði rentustøðið og oljuprísir hækkað nógv í hesum tíðarskeiði. Hetta merkir eisini lægri tilfeingisrentu. Harumframt eru fleiri nýggj skip komin í flotan, og tað merkir eina lægri roknaða tilfeingisrentu, tí at flotin fær eitt hægri avkastkrav. Eisini er atgongdin at fiska makrel versnað, og tað merkir, at kostnaðurin at fiska er munandi hægri. Tó er makrelkvotan eisini hækkað samstundis.

Greitt er eisini, at uppskotið fer at raka heimaflotan meint. Heimaflotin hevur havt sera tungan rakstur í nógv ár, og hesin partur av flotanum hevur einki yvirnormalt avkast av sínum vanliga virksemi. Summi reiðarí hava nýtt hetta til at hava fastlønarskipanir umborð á t.d. trolarum, og tað hevur givið eitt ávíst støðufesti ísv. manning av skipum. Makrelkvoturnar hava skapt eitt ávíst grundarlag hjá summum at umhugsa bygging av nýggjum skipum. Hetta uppskotið stuðlar ikki undir hesa tilgongd.

Sagt verður í viðmerkingunum til uppskotið, at ein størri tilfeingisrenta er knýtt at rættindum at veiða makrel, og hetta sæst, tá ið uppsjóvarskip fiska makrel fyri heimaflotan. Føroya Reiðarafelag vil staðiliga vísa á, at hetta hevur als einki samband við tilfeingisrentu ella yvirnormalt avkast. Talan er um eina skipan, sum upprunaliga stavar frá tíðini, tá ið uppsjóvarskip fiskaðu kvotu fyri bólk 2 í bretskum sjógvi, og tá lat hetta seg gera fyri einstakar túrar.

Veruleikin er, at hetta hevur einki samband við tað gjaldið, sum flotin kann bera. Í roynd og veru høvdu fleiri trolarar trupulleikar við at fáa uppsjóvarskip at fiska makrel fyri seg í fjør, og tí varð ein partur av hesum makreli ófiskaður. Eisini eru dømi um uppsjóvarskip, ið veiddu eftir hesum leisti, har manningin fekk minstuløn, tí at hýran gjørdist ov lág. Fíggjarmálaráðið misskilur sostatt hendan samanhangin og eigur tí ikki at nýta hesa grundgeving í viðmerkingunum.

Tørvur landskassans er stýrandi

Greitt er, at tað er fíggjarligi tørvur landskassans, sum er grundarlagið undir hesi hækking av veiðigjøldum. Tað er ikki sørt órógvandi, at landið krevur fullan tryggleika fyri sínum inntøkum og letur allan váðan liggja hjá vinnu og manningum.

Vandin við at fíggja vallyfti við veiðigjøldum úr fiskivinnuni er, at grundarlagið undir hesum inntøkum kann vera svikaligt. Uppsjóvarkvoturnar eru í løtuni søguliga høgar, og um strandarlandaavtalur koma í lag, kunnu inntøkur landsins minka munandi. Tí er spurningurin, um øll tey lyfti, ið hækkaðu veiðigjøldini skulu rinda fyri, eru fíggjað í longdini. Einastu veruligu átøkini fyri at skapa fíggjarligt haldføri í landskassanum eru hægri veiði- og tøkugjøld. Tískil er vandi fyri, at hækking av gjøldum gerst ein undanførsla fyri at sleppa undan at føra ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk í tí almenna geiranum.

Samgongan hevur gjørt greitt, at landið skal hava ein munandi men rímiligan part av sonevndu tilfeingisrentuni, men eingin meting verður gjørd av yvirnormalum avkasti í uppskotinum, og einki tal verður nevnt yvirhøvur. Einastu útrokningarnar, sum eru gjørdar, eru av inntøkum landslassans komandi árini. Sostatt byggir uppskotið ikki á eina sakliga viðgerð, sum kann eftirkannast ella metast um.

Inntøkur landsins frá veiðigjøldum vera methøgar í 2022 og í 2023. Kortini er neyðugt hjá landinum at hækka gjøldini í tveimum umførum. Seinna hækkingin er við tí grundgeving, at inntøkur landsins ikki skulu lækka, tá ið kvotur verða lagdar um frá uppboðssølugjaldi til veiðigjald í 2026. Hetta er ein ósaklig grundgeving, og tí átti seinna hækkingin at verið strikað.

Først varð fram undir 1. viðgerð av uppskotinum, at umsitingini vantar greiningar, sum vórðu gjørdar av fíggjarligu gongdini hjá fiskiflotanum í 2017 og árini frammanundan. Sagt varð, at hesar upplýsingar ikki eru at finna meira. Hetta er ikki rætt. Allar upplýsingar frá tí greiningini eru at finna í roknskapinum hjá feløgunum, sum reka fiskivinnu, og tað er møguligt at seta hesar upplýsingar upp á sama hátt sum í teimum greiningunum. Tað krevst bert, at onkur lesur roknskapirnar og ger hetta arbeiðið. Ársroknskaparlógin er galdandi fyri føroysk partafeløg, og tí hava reiðaríini skyldu til at veita rættar upplýsingar í teirra roknskapi.

Samanumtikið verður mælt til at lata verandi skipan virka eina tíð fyri at meta um fyrimunir og vansar. Mælt verður eisini til at strika ta seinnu hækkingina í 2026 vegna vantandi grundgevgingar og fyri at vísa neyðuga fyrivarnið fyri vinnu og starvsfólki. Síðani eigur landsstýrið at gera eina skipaða eftirmeting saman við vinnu og Reiðarafelagnum. Tástani er møguligt at gera møguligar broytingar í einari skipaðari tilgongd.

Sí nærri lýsing av hækkingunum í veiðigjøldum í talvunum niðanfyri.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri

1 Barentshavið

Samanbering av veiðugjøldum - Verandi gjøld í mun til uppskotið fyri ávikavist 1. august 2023 og 1. august 2026

Prísur toskur	Verandi skipan	1.aug.23	1.aug.26	1.aug.23	1.aug.26
Kiloprísur	Kilogjald	Kilogjald	Kilogjald	Avgjaldsbroyting	Avgjaldsbroyting
13.50	0,37	0,41	0,68	9,1%	81,8%
14.50	0,47	0,51	0,80	7,7%	69,2%
15,50	0,54	0,62	0,89	14,3%	64,3%
16,50	0,70	0,74	1,07	5,9%	52,9%
17,50	0,83	0,88	1,23	5,3%	47,4%
18,50	0,93	1,02	1,39	10%	50%
19,50	0,98	1,12	1,56	15%	60%
20,50	1,03	1,33	1,69	30%	65%
21,50	1,08	1,51	1,94	40%	80%
22,50	1,13	1,69	2,14	50%	90%
23.50	1,18	1,88	2,35	60%	100%
24.50	1,23	2,08	2,57	70%	110%
25.50	1,28	2,30	2,81	80%	120%
26.50	1,33	2,39	2,92	80%	120%

2 Sild

Samanbering av veiðugjøldum - Verandi gjøld í mun til uppskotið fyri ávikavist 1. august 2023 og 1. august 2026

Prísur sild	Verandi skipan	1.aug.23	1.aug.26	1.aug.23	1.aug.26
Kiloprísur	Kilogjald	Kilogjald	Kilogjald	Avgjaldsbroytin g	Avgjaldsbroyting
2,50	0,40	0,25	0,30	-37,5%	-25,0%
3,50	0,60	0,49	0,56	-17,6%	-5,9%
4,50	0,81	0,81	0,90	0,0%	11,1%
5,50	1,05	1,10	1,21	5,3%	15,8%
6,50	1,27	1,43	1,56	12,8%	23,1%
7,50	1,46	1,80	1,95	23,1%	33,3%
8,50	1,66	2,21	2,38	33,3%	43,6%
9,50	1,85	2,66	2,85	43,6%	53,8%
10,50	2,05	3,15	3,36	53,8%	64,1%
11,50	2,24	3,68	3,91	64,1%	74,4%
12,50	2,44	4,25	4,50	74,4%	84,6%
13,50	2,63	4,59	4,86	74,4%	84,6%

3 Makrelur

Samanbering av veiðugjøldum - Verandi gjøld í mun til uppskotið fyri ávikavist 1. august 2023 og 1. august 2026

Prísur makrel	Verandi skipan	01.aug.23	1.aug.26	01.aug.23	01.aug.26
Kiloprísur	Kilogjald	Kilogjald	Kilogjald	Avgjaldsbroytin g	Avgjaldsbroyting
4,00	0,70	0,64	0,72	-8,6%	2,9%
5,00	0,88	0,95	1,05	8,6%	20,0%
6,00	1,08	1,26	1,38	16,7%	27,8%
7,00	1,33	1,61	1,75	21,1%	31,6%
8,00	1,60	2,00	2,16	25,0%	35,0%
9,00	1,89	2,43	2,61	28,6%	38,1%
10,00	2,15	2,90	3,10	34,9%	44,2%
11,00	2,37	3,41	3,63	44,2%	53,5%
12,00	2,58	3,96	4,20	53,5%	62,8%
13,00	2,80	4,42	4,68	58,1%	67,4%
14,00	3,01	4,76	5,04	58,1%	67,4%
15,00	3,23	5,10	5,40	58,1%	67,4%

4 Svartkjaftur

Samanbering av veiðugjøldum - Verandi gjøld í mun til uppskotið fyri ávikavist 1. august 2023 og 1. august 2026

Prísur svartkjaftur	Verandi skipan	01.aug.23	01.aug.26	01.aug.23	01.aug.26
Kiloprísur	Kilogjald	Kilogjald	Kilogjald	Avgjaldsbroyt ing	Avgjaldsbroyting
1,00	0,11	0,05	0,07	-54,5%	-36,4%
1,40	0,17	0,20	0,22	16,7%	33,3%
1,60	0,21	0,24	0,27	15,4%	30,8%
1,80	0,25	0,29	0,32	14,3%	28,6%
2,00	0,30	0,34	0,38	13,3%	26,7%
2,20	0,35	0,40	0,44	12,5%	25,0%
2,40	0,41	0,46	0,50	11,8%	23,5%
2,60	0,44	0,52	0,57	17,6%	29,4%
2,80	0,48	0,59	0,64	23,5%	35,3%
3,00	0,51	0,66	0,72	29,4%	41,2%
3,20	0,54	0,74	0,80	35,3%	47,1%
3,40	0,58	0,82	0,88	41,2%	52,9%